

# Evni fyri 1000 mia. á norska havbotninum

**Jan Müller**

18.02.2014 - 15:26

Oljan.fo

Norskir granskarar meta, at stórar nøgdir av metalsulfidum eru á norska havbotninum.

Metingina byggja teir á nýggjar útrokningar, sum benda á, at kopar, zink, silvur og gull fyri ímillum 430 og 1.000 milliardir krónur er á havbotninum. Tað svarar til ein fimtapart av tí, sum er í norska Oljugrunninum, skrivar granskingartíðarritið Gemini, men her skal havast í huga, at talan er um bruttotøl, og at útreiðslurnar ikki eru drignar frá.

Teir norsku granskararnir byggja sína meting á kanningar, sum eru gjørdar í tí norðara partinum av tí miðatlantiska rygginum. Fram við rygginum er gosvirksemi, sum hevur myndað millum annað Ísland og Jan Mayen. Kókandi heitur sjógvur hevur mineralir og metallir við sær upp úr dýpinum, og tá hesi koma í samband við tann kalda sjógvin, koma evnini gull, silvur, kopar, kobolt, zink og blýggj burturúr.

Ingvald Strømmen hjá NTNU sigur við norskar fjølmiðlar, at tey stóru tølini í metingini geva grundarlag fyri at halda fram við verkætlanini fyri at menna vitanina um tilfeingið í havinum, og hvussu tað ber til at umsita tey á ein burðardyggan hátt.